# Kiosk Vár byggja nýggj høli í Runavík

**Kiosk Vár í Runavík skal flyta. Nýggj høli skulu byggjast og verða klár tann 1. januar. Samstundis hava tey sett handilin í Klaksvík til sølu. – Tað kann verða nakað tungt at reka tríggjar handlar, tá ein samstundis skal byggja nýggj høli, men vit hava kortini ikki tikið nakra avgerð enn, sigur Poula Ellingsgaard**

SØLA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




*Kiosk Vár í Klaksvík er til sølu, meðan nýggj høli skulu byggjast til handilin í Runavík. Poula Ellingsgaard sigur tó, at enn fyriliggur ongin endalig støða viðvíkjandi søluni*

Kiosk Vár í Runavík heldur, sum er, til í hølum hjá Tryggingini. Men Tryggingin hevur boðað frá, at tey skulu brúka hølini tann 1. januar. So til ta tíð skulu nýggju hølini hjá Kiosk Vár helst verða liðug. Byggingin er ikki farin í gongd enn, men Poula hevur kortini góðar vónir um, at tað fer at eydnast teimum at náa tað.

– Vit arbeiða við hesum í fullari ferð. Alt er ikki endaliga komið upp á pláss, men tað er eyðsæð, at byggingin helst skuldi farið í gongd, sum skjótast, sigur hon.

Nýggju hølini hjá Kiosk Vár í Runavík koma at liggja við høvuðsvegin, so umstøðurnar verða tær somu, sum tær eru í dag.

Poula greiðir frá, at alternativið, um tey ikki náa at fáa tann nýggja bygningin lidnan til tíðina, eru smærri høli. Men tað gongur als ikki sambært henni, tí verandi høli í Runavík, eru í minna lagi, sum er.

### Selja í Klaksvík

Samstundis sum alt hetta fer fram, stendur handilin í Klaksvík til sølu.

Poula sigur, at við nýbygging kann tað fara at verða sera hart at reka tríggjar handlar samstundis, og tískil hava tey gjørt av at royna at selja handilin í Klaksvík.

– Men vit selja bara, um vit fáa eitt gott tilboð, tí handilin í Klaksvík er sera spennandi, sigur hon.

Kiosk Vár í Klaksvík hevur nú trý ár á baki, og hevur handilin havt framgongd øll árini. Poula leggur tískil dent á, at niðurgongd ikki er ein orsøk til, at handilin nú er til sølu.

Hon sigur eisini, at tey hava fingið fleiri áhugaverd boð, og at áhugin letur til at vera stórur.

– Men vit hava ikki tikið nakra endaliga støðu enn. Tað er jú við blandaðum kenslum, at ein setur ein handil, sum gongur væl, til sølu, sigur hon.

Poula leggur at enda afturat, at tey ikki hava nakrar ætlanir um at seta skógvahandilin í Klaksvík, Pattino, til sølu, sum nú er.

– Vit halda bara, at tað kann verða tungt, tá vit byggja nýtt at hava tveir aðrar handlar at reka, sigur hon.

# Uttanalandsnevndin í Danmark

**Uttanlandsnevndin hjá Løgtinginum hevur fyri stuttum verið í Danmark og hitt millum onnur forsætisráðharran**

VITJAN
*Edvard Joensen*



*Uttanlandsnevndin hjá Løgtinginum, sum Johan Dahl er formaður fyri, hevur nýliga verið í Danmark og tosað við danskar politikarar um føroysk viðurskifti*

Uttanlandsnevndin var herfyri í Danmark og vitjaði eftir innbjóðing frá 21 mannanevndini, sum Fólkatingið hevur valt at viðgera føroysk viðurskifti.

Millum annað var føroyska ferðalagið á Marienborg og vitjaði Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra, sigur Johan Dahl, formaður í Uttanlandsnevndini.

Tosað varð millum annað við forsætisráðharran um flogvøll.

– Hann tykist positivur og vil finna loysnir, sum báðir partar kunnu verða kentir við, sigur Johan Dahl.

Nevndin kann ikki taka nakrar avgerðir í hesum málinum, sum í løtuni liggur hjá forsætisráðharranum og løgmanni. Men nevndin er so kunnað um, at gongd er í málinum, sum nú er hjá embætisfólki til viðgerðar.

Fundur var eisini við 21 mannanevndina, har tosað varð um ymisk viðurskifti, ið hava við Føroyar at gera.

Føroyingarnir kunnaðu nevndina um eitt nú støðuna í føroysku alivinnuni, og so varð eisini komið inn á málið um blokkstuðulin.

– Tað er eingin ivi um, at danskir politikarar vilja halda seg til gjørdar avtalur, sigur Johan Dahl, formaður í Uttanríkisnevndini hjá Løgtinginum. Tað, sum avtalað er, verður standandi. Og verandi samgonga hevur ongar ætlanir í løtuni um at gera nakrar broytingar, sigur hann.

Ferðin var ein kunningarferð, ið er vanlig báðar vegir. Danska 21 mannanevndin er eisini av og á í Føroyum og vitjar. Ongar avtalur verða gjørdar á slíkum ferðum, sigur Johan Dahl, nevndarformaður.

# Tobbi spyr um Suðuroynna

Torbjørn Jacobsen setir mikudagin løgmanni fyrispurning um, hvørji úrslit, ella ávegis úrslit, er parlamentariska nevndin, ella bólkurin, komin til, sum sett varð niður til at menna sunnaru helvt av Suðuroynni vinnuliga ?

Tingmaðurin vísir á, at síðani hendan samgongan tók við, hevur talan verið um heilt nýggja mannagongd, tá tvørleikar taka seg upp í samfelagnum.

– Ístaðin fyri at gera nakað við trupulleikarnar, verða alskins bólkar settir niður at fylgja viðkomandi málum. Oftast eru tað tingmenn úr samgonguni, ið manna hesar fylgibólkar, sigur tingmaðurin.

Víðari sigur hann, at tað er almenn vitan, at vinnuliga støðan í sunnaru helvt av Suðuroynni er út av lagi ring.

– Samgongan setti í hesum sambandi ein bólk, sum segðist hava til endamáls at menna hetta økið aftur. Í bólkin vóru valdir Jóhan Dahl, Hendrik Old og Jørgen Niclasen.

– Bólkurin var settur niður fyri nærum hálvum ári síðani, men lítið hevur verið at frætt frá honum síðani hann fór til verka, sigur Torbjørn Jacobsen, sum altso vil hava at vita um arbeiðið, sum hesin bólkurin hevur framt.

**-jm**



# Væleydnað tiltak

**Bæði bólkar og fyriskiparar vóru sera væl nøgdir við tiltakið í Vega**

NØGDSEMI
*Niels Uni Dam*



*Talan var um eitt framúr tiltak Vega, har føroyskir bólkar veruliga fingu høvi at royna seg*

Fróði Vestergaard, sum samskipaði tiltakið fyri Norðurlandahúsið, var ovfarin av góðu uppmøtingini. Hann hevði ikki væntað, at tað fór at vera útselt. Í Vega søgdu fyriskipararnir, at alt yvir 200 fólk var eitt gott tiltak, so at fáa 500 fólk á konsert var avbera gott.

### Nøgdir tónleikarar

Eisini luttakandi bólkarnir vóru glaðir fyri upplivingina. Gestir hildu tað vera ordiliga stuttligt at spæla fyri teimum nógvu áhoyrarunum. Tey lurtaðu veruliga, og tað var øðiliga nøktandi. Tað gekk eisini væl at spæla, tá er tað altíð stuttligt, og tað vaks um spæligleðina.

Teir hildu eisini, at tað var stuttligt at áhoyrararnir vóru so blandaðir, har vóru føroyingar, danskarar og íslendingar. Fyri nógvar av áhoyrarunum vóru Gestir ikki annað enn eitt navn á plakatini, og tey lurtaðu tí heilt opin.

### Hoyrdu illa

Eivør helt Vega vera eitt deiligt spælistað, umstøðurnar vóru sera góðar. Áhoyrararnir vóru eisini ordiliga góðir, so í so máta var kvøldið væleydnað. Men pallljóðið hjá Eivør var út av lagi vánaligt, og tað oyðilegði nógv fyri hennara uppliving. Eivør og Bill Bourne hoyrdu illa hvat tey gjørdu, og tvær ferðirnar var heilt galið. Einu ferðina kom knappiliga ein reinging á røddina hjá Eivør, og eitt sindur seinni ýldi úr einum av hátalarunum. Eivør helt tó at góðu áhoyrararnir vigaðu upp fyri tað keðiliga ljóðið.

### Makrel Vega nøgdir

Makrel søgdu seg ikki bara vera mega nøgdar, men Vega nøgdar. Tað gekk ordiliga væl at spæla og áhoyrararnir virkaðu áhugaðir í tónleikinum. Hetta var fyrstu ferð Makrel spældu í Danmark. Teir vóru tí eitt sindur ivasamir um hvussu tað fór at rigga. Men teir vóru sera glaðir at fólk tóku so væl ímóti teimum.

Teir hildu eisini umstøðurnar rundanum tiltakið vera super. Hølini har tónleikararnir hildu til aftan fyri pallin vóru lekkur, við køliskápi fyltum við drykkivørum og mati, og frukt og bommskálum á borðunum. Her kundu føroyskir fyrireikarar sambært Makrel lært nakað.

### Serligt upplivilsi fyri Rasmus

Fyri gittarleikaran í Makrel, Rasmus Rasmussen, var upplivingin heilt serlig. Tá hann trein á pallin, sá hann 10 fólk, sum hann hevði gingið á háskúla við, standa fremst við pallin og bíða. Tey høvdu frætt at gamli skúlafelagin skuldi spæla, og vóru komin í Vega fyri at hoyra hann. Hetta var fyrstu ferð í yvir eitt ár at hann sá tey.

### Umaftur? Umaftur?

Tiltakið kom í lag tá Brynhild Kalsø, sum arbeiðir í Vega, var í starvsvenjing í Norðurlandahúsinum. Hon sannførdi nevndina í Vega um at latað hurðarnar upp fyri einum føroyskum tiltaki.

Í Vega eru fyrireikararnir sum sagt stak nøgdir við tiltakið, og vilja fegin gera tað aftur.

Fróði Vestergaard sigur, at tað er ein møguleiki fyri at tað verður gjørt aftur, men hetta krevur at Atlantic Airways aftur verður við sum stuðul. Tí við so nógvum ferðandi er tað alneyðugt við lagaligum ferðaseðlaprísum, uttan stuðulin frá ikki bert Atlantic men eisini hinum stuðlunum, hevði hetta ikki borið til.

# Eivør er størsta talentið tit hava!

**Eivør er eitt ótrúligt talent, og hon gerst bara betri og betri sigur Jens Ove Friis, sum starvast hjá Rec Art Music**

EIVØR
*Niels Uni Dam*

*Hon er ment 80%, og tann dagin ein sera dugnaligur plátumaður, tekur hana undir sínar veingir, og hjálpir hennið at røkka tey seinastu 20%, sigur Jens Ove Friis um Eivør*



Tað vóru ikki nógv andlit úr danska tónleikaídnaðinum aftanfyri pallin leygarkvøldið tá konsertin í Vega var av, vónandi vóru fleiri í salinum. Tó var eitt undantak. Jens Ove Friis frá Rec Art Music, sum hevur verið í Føroyum í sambandi við nógvar tær seinastu Prix Føroyar finalurnar, hevði leitað sær handan pallin.

JOF, sum hann verður róptur, stóð og tosaði við Fróða Vestergaard tá eg kom afturum pallin. Hann var prátingarsamur og vinarligur, og vildi fegin siga mær frá um hansara meting av bólkunum og tiltakinum sum heild. Vit funnu ein krók har vit fingu frið og stólar at sita á.

### Býtt plátufeløg

Hann segði seg gleðast almikið, vegna føroyskan tónleik, at eitt slíkt samstarv var komið í lag við Vega. Hann ætlaði sær at boða øllum plátufeløgunum, sum hann samstarvaði við, frá næstu ferð tílíkt tiltak varð. Tí sum hann segði: »Fyri plátufeløg, er tað einki minnið enn býtt ikki at brúka hendan møguleika at síggja føroyskar bólkar«.

JOF segði seg fyrst og fremst vera komnan fyri at hoyra Eivør. »Hon er eitt ótrúligt talent«. Hann metti hana vera største talentið føroyingar hava í løtuni. Hann hevði vænta nógv áðrenn konsertina, og hon livdi fult upp til vónirnar.

Hann helt konsertina vera inniliga og góða. »Hon gerst betri og betri hvørja ferð eg hoyri hana«. Hann helt tó ikki, at hon hevur ment sítt talent til fulnar. Hon er ment 80%, og tann dagin ein sera dugnaligur plátumaður, tekur hana undir sínar veingir, og hjálpir hennið at røkka tey seinastu 20%, so skriva tey tónleikasøgu. Hetta krevur tó ein stak dugnaligan plátumann, sum mennir talentið uttan at oyðileggja tað.

### Gestir ov innanhoknir

JOF kendi Gestir úr Prix høpi og helt bólkin vera dekan ov innanhoknan og tunglyntan. Hann legði tó dent á, at hetta bert var hansara persónliga meining.

Hann kendi eisini Makrel framman undan, og hevði lurtað eftir nýggju fløguni, sum honum dámdi væl. Hann var ikki komin tá Makrel spældu, og vildi tí helst ikki siga ov nógv um bólkin, tó ætlaði hann at lurta eftir fløguni aftur.

# Makrel og Eivør hyggja úteftir, Gestir hyggja inneftir

TÓNLEIKAFRAMTÍÐ
*Niels Uni Dam*

Eg hitti eftir konsertina leygarkvøldið luttakandi bólkarnar, og vit prátaðu um nútíðina og framtíðina. Meðan Eivør seinastu árini hevur spælt nógv meira uttanlanda enn heima, royna Makrel nú at skapa sambond úteftir, og Gestir leita eftir sínum veruliga tónlistarliga samleika.

### 100 fløgur við postinum

Makrel hava seinastu árini roynt tað, sum er at royna tónlistarliga í Føroyum, og vilja tí hava nýggjar avbjóðingar.

Teir góvu fyrr í summar fløguna Wonderland út. Hetta er ein fløga sum nógv arbeiði er lagt í, og sum teir eru sera væl nøgdir við. Hon hevur bæði í orðum og tónleiki ein reyðan trá sum gongur gjøgnum alla fløguna.

Teir royna í løtuni at fáa fløguna fram uttanlanda. Teir hava higartil sent 100 eintøk av Wonderland til umboðsmenn, plátufeløg, fyriskiparar og fjølmiðlar í útlondum og komandi hálva ári verður nýtt til hetta arbeiðið.

### Royna at finna upprunan

Tá Gestir í 2003 vunnu Prix Føroyar var bólkurin rættuliga nýggjur. Við luttøku á Listastevnuni og á fleiri donskum festivalum, var trýstið stórt á bólkin, at skriva nógv løg skjótt. Hetta gekk sambært Gestum útyvir góðskuna á løgunum.

Tá teir um heystið 2003 fóru í Lundgaard Studio at spæla inn í eina viku, vóru teir slett ikki nøgdir við úrslitið. Sambært Gestum sóu teir, at neyðugt var at slække av og royna at finna upprunan til bólkin aftur.

Gittarleikarin Torfinnur og sangarin Ólavur, settu seg saman at arbeiða við nýggjum løgum, og royndu at taka støði í tí tónleiki, sum teir arbeiddu við áðrenn Prix Føroyar. Teir gjørdust nógv betri við hesi løgini, enn løgini teir skrivaðu summarið 2003.

### Bjartskygdur tónleikur

Bæði tónlistarliga og í orðum hevur bólkurin á nøkrum at nýggju løgunum roynt at skapt ein bjartskygdan boðskap. Tónleikur er ein sera sterkur miðil sum rakar nógv fólk, og teir siga seg tí hugsa nógv um hvønn boðskap teir vilja bera fram.

Spurdir um nær ein Gestir fløga kemur, svaraðu teir »ikki enn«, men tá fløgan kemur verður tað ein heil fløga, og ikki ein maxifløga av onkrum slag.

### Eina einfalda fløgu

Eivør arbeiðir í løtuni saman við kanadiumanninum Bill Bourne. Bourne spælir á komandi fløguni og hjálpir eisini Eivør við at framleiða hana.

Fløgan verður á fýra málum: føroyskum, íslendskum, svenskum og enskum. Málsliga fjølbroytni hendi sambært Eivør bara. Íslendsku løgini eru tolkingar av gomlum íslendskum vísum sum Eivør er góð við. Tvey av teimum ensku hevur Bill Bourne skrivað, og hon hevur sjálv skriva eitt enskt lag til samstarvið við Bourne. Tey bæði svensku løgini hevu Eivør skrivað tí henni dámar so væl svenska málið.

Hetta verður ein annaleiðis fløga, men eisini ein fløga sum Eivør altíð hevur ynskt at gera. Ein einfald fløga, beint frá hjartanum og nú ger hon hana.